# Bretar bjálva við seyðaull



**Eitt av uppskotunum hjá skúlaflokkinum á Ziskatrøð í Klaksvík er, at hitin í brennistøð verður gjørdur um til orku at framleiða bjálvingartilfar úr seyðaull. Hetta er fremmant í Føroyum, men í Bretlandi verður ull brúkt framleidd til bjálving**

UMHVØRVIÐ
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Í Føroyum er eingin yvirskipað innsavnan av ull. Nakrar fyritøkur keypa ull, men nógv fer upp í royk á brennistøðunum. Teir 13-14 ára gomlu næmingarnir hava skotið upp, at ullin verður gjørd til bjálvingartilfar.

Olga Biskupstøð, stjóri á ullafyritøkuni Filana í Klaksvík, sigur, at tey hava kannað møguleikan at gera ull til bjálvingartilfar.

- Í Bretlandi verður øll ull savnað inn, og har eru fyritøkur, sum gera ull til bjálving. Útgerðin til hetta er dýr, og tilfarið verður so dýrt, at tað ikki er heilt kappingarført við eftirgjørda ull. Men í Bretlandi hevur staturin tildømis valt at renovera gamlar kirkjur við seyðaull. Hetta bæði tí tey ynskja at vera umhvørvisvinarlig og fyri at stuðla undir, at ullin verður gagnnýtt, greiðir Olga Biskupstøð frá.

Hon sigur, at bretska fyritøkan eisini keypir ull aðrastaðni frá, og tey hava eisini víst áhuga í føroysku ullini.

- Um vit høvdu eina miðstøð í Føroyum, har øll ull varð savnað inn, so kundi nakað verði nýtt til tógvframleiðslu og restin verið gjørd til bjálving antin her ella aðrastaðni. Men hetta krevur eina lóg, sum ásetir, at øll ull verður fingin til høldar.

### Eingin føroyskur áhugi

Olga Biskupstøð hevur saman við øðrum roynt at fingið gamla spinnaríðið í Klaksvík upp aftur at koyra. Men royndirnar hava víst, at tað ikki er lætt at seta ullaframleiðslu í gongd í Føroyum.

- Ullin er ein góð rávøra, og marknaður er fyri henni. Men eingin vil gera íløgu í slíka framleiðslu. Vit hava verið hjá øllum føroysku íleggjarunum, men eingin áhugi er. Fyri veruliga at fáa framleiðsluna upp at koyra, har vit kunnu fáa ullina nappaða í Kina og vaskaða í Íslandi og síðani framleidda í Føroyum, mugu vit hava eina íløgu á tvær milliónir, men hetta letur seg als ikki gera, og tí vænti eg, at vit uppgeva og selja heilt skjótt, sigur Olga Biskupstøð.

### Bretsk nýhugsan

Í Stórabretlandi hevur man havt sama trupulleika sum í Føroyum. Bøndir komu í neyð av seyðaull, tí teir fingu so vánaligan prís. Har verður ullin savnað inn í The British Wool Marketing Board í Bradford, sum var sett á stovn í 1950. Hesin felagsskapur selur síðani ullina á uppboðssølu.

Av tí at prísurin hevur verið støðugt fallandi seinastu árini, hava fleiri bretskir bøndir leitað eftir alternativum møguleikum. Sambært BBC verður ull í dag brúkt til millum annað kompostframleiðslu og bjálving.



*Ein av bretsku bjálvingarframleiðarum er Christine Armstrong og fyritøkan, Second Nature. Hetta er ein mynd av heimasíðuni, har til ber at keypa nátturliga ullabjálving*




## TransAtlantic Climate Conference

7- 8 apríl 2008 | Norðurlandahúsið | www.tacc2008.com

### DAG 1 // 7. APRÍL

**10.00**
**Vælkomin**
Kjartan Hoydal, Skrivari hjá The North East Atlantic Fisheries Commission (NEAFC) og leiðari av ráðstevnuni.

**10.10**
**Setanarrøður**
Jóhan Páll Joensen, Formaður hjá Arbeiðsgevarafelagnum
Helena Dam á Neystabø, Landstýriskvinna í lógarmálum

**10.30**
**Norðureystur Atlantshav og alheims umhvørviðsbroytingar**
Bogi Hansen, Havfrøðingur og vinnari av náttúru - & umhvørvisheiðurslønini hjá Norðurlandaráðnum

**11.00**
**Umhvørvisbroytingar sæð úr einum grønlendskum sjónarhornið**
Josef Motzfeldt, Grønlendskur landstingslimur og fyrrverandi uttanríkismálaráðharri

**11.30**
Steðgur

**12.00**
**Burðardyggur og ábyrgdarfullur fiskivinnupolitikkur**
Einar K. Guðfinnsson, Íslendskur fiskimálaráðharri

**12.20**
**Regional árin av vitanarbúskapi og umhvørvisbroytingum**
Rasmus Ole Rasmussen, Professari á Roskilde Universiteti

**12.45**
**Visjónin við The TransAtlantic Climate Institute (TACIT)**
Magni Arge, Stjóri á Atlantic Airways

**13.00**
Døgurði

**14.00**
**Høvuðsrøðari:**
Umhvørvisbroytingar og altjóða árin við serligum atliti til havumhvørvið
Al Gore, vinnari av Nobel Heiðurslønini 2007 og fyrrverandi varaforseti í USA

**15.30**
Spurnarløta

**16.00**
Endi av degi eitt

### DAG 2 // 8. APRÍL

**09.00-09.30**
**Samandráttur frá fyrra degnum og innleiðing til verkstovur**
Magni Arge, stjóri fyri Atlantic Airways og orðstýrari á seinna degnum.
Á verkstovunum verða fyrilestrar um ymisk evnir. Harumframt verður høvið at seta spurningar og gera viðmerkingar.

Niðanfyri eru dømir um fyrilestraevnir á verkstovunum. Á hvørjari verkstovu verða tilsamans 6 evnir viðgjørd.

**09.30**
**Verkstovurnar byrja**

**// Verkstova 1**
**Havumhvørvið og burðardygg tilfeingisstýring – Michaela Aschan, professari**
Árin av fiskiveiðu og veðurlagsbroytingum á vistfrøðiskipanina í Norður atlantshavi. Ein samanbering av toskastovnum í Barentshavinum og Norðuratlantshavinum og metingar av framtíðar útlitum í mun til hitabroytingar í sjónum.

**// Verkstova 2**
**Burðardygg fiskivinna í mun til marknað, umdømi og íløgur – Orri Vigfússon, burðardyggur veiðumaður**
Hvussu umhvørvið í Norðuratlantshavið kann gerast ein fyrimynd í lívfrøðiligum margfeldi og burðardyggari menning.

**// Verkstova 3**
**Nýskapan innan orku og umhvørvisliga tøkni á sjógvi og landi – Olaf Olsen, fyrrverandi reiðari**
Ymiskir hættir fyri orkusparing í fiskiflotanum grundað á hagtalsroyndir

**// Verkstova 4**
**TACIT sum ein vitanardepil – Vilhjálmur Nielsen, ráðgevi**
Úrslit av forkanningini um altjóða áhugan fyri TransAtlantic Climate Institute (TACIT)

Fullfíggjað yvirlit er á www.tacc2008.com

**15:45-16:45**
Panelfundur við samandráttum frá einstøku verkstovunum.

**16:45-16:55**
Ráðstevnan endar.

Eik | FØROYABANKI | FRAMTAK | norden | FØROYA TELE | ATLANTIC AIRWAYS | SamVit | bitland enterprise | VINNUHÚSIÐ House of Industry